Landsfelag Pensjónista

Fylgiskjal 2

Almanna- og mentamálaráðið

Argir 27.02.2024

Verður sent við telduposti til ammr@ammr.fo

HOYRINGSSVAR

Almanna- og mentamálaráðið hevur sent Landsfelag Pensjónista til ummælis:

Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl. (Markið fyri inntøku, ið verður skattað eftir kapitalvinningsskattalógini, verður hækkað o.a.)

Landsfelag Pensjónista tekur undir við broytingaruppskotinum í § 3. stk. 2, har markið fyri kapitalvinningi hækkar úr 2.000 kr. upp til 12.600 kr.

Landsfelag Pensjónista vil loyva sær at gera nakrar viðmerkingar til galdandi lóggávu í samband við umrøddu viðbót:

Í løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v. fl. , sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desembur 2021 stendur í § 3 sum ætlan er at broyta, hevur tvey stk., og har stendur soleiðis:
Stk. 1 Treytin fyri at fáa viðbótina er, at pensjónistur, saman við hjúnafelaga ella samlivandi, ikki hevur hægri ársinntøku umframt pensjónina enn kr. 80.000,00 og at stakur pensjónistur ikki hevur hægri ársinntøku umframt pensjónina enn kr. 60.000,00.
Stk. 2 Umframt ásetingina í stk. 1 er viðbótin treytað av, at virðið av nettoinntøku, ið verður skattað eftir reglunum í kapitalvinningsskattalógini, og sum er partur av inntøkugrundarlagnum sambært § 6 a, ikki er omanfyri kr. 2.000 árliga. (sum nú verður broytt til 12.600 kr.)
Um identitetur í fyriliggjandi uppskotið verður varðveittur, tá tað snýr seg um stk. 1 í somu grein 3 í lógini, ivast vit í, tá uppskotið snýr seg um stk. 2, men tá hetta er eitt uppskot sum er sent til hoyringar, loyva vit opkkum at koma við hesum ískoytinum til lógaruppskotið § 3 stk. 1.

Landsfelag Pensjónista metir, at tað er sera óheppið, at pensjónistar kunnu hava eina inntøku uppá 61.900,00 kr. áðrenn tað gongur út yvir pensjónina, meðan pensjónistar missa viðbótina til ávísar pensjónistar (brennistuðulin), tá teir fara uppum 60.000,00 kr. Roknast kann við, at fleiri pensjónistar av misgávum fara upp til 61.900 kr. í inntøku og tí óvæntað fáa eina rokning uppá 8.600,00 kr. árið eftir, fyri ov nógv goldna viðbót.
Landsfelag Pensjónista vil tí mæla til:

1) at hækka upphæddina upp til 100.000,00 ella í minsta lagið upp til 61.900,00.
2) ella at minka mótrokningina so líðandi inntil inntøka svarar til hálvtíðarstarv, t.v.s. uml. 150.000,00 kr.

Vinarliga

v. Landsfelag Pensjónista

Beate L. Samuelsen, forkvinna